H71–VÍF 22–32 (10–17)

# Lættur VÍF sigur á Hálsi

**Dysturin millum H71 og VÍF í høllini á Hálsi sunnudagin var ein avgreiðsluspurningur hjá VÌF, sum vann sera sannførandi við tíggju málum. Nógv mistøk og ónærlagni setti sín dám á dystin, men samstundis var í løtum gott hondbóltsspæl at síggja**

HONDBÓLTUR
*Heini í Skorini*



*Vestmenningar høvdu ongar trupulleikar av at basa hoyvíkingum, og nú eru teir gulu bert ein dyst frá gullinum*

Oddaliðið VÍF úr Vestmanna var sunnudagin í høllini á Hálsi og vitjaði H71. VÍF var stórfavorittur undan dystinum, við tað at teir í ár hava verið klárt besta liðið í 1. deild hjá monnum í ár. Harafturímóti hevur H71 ikki megnað at givið teimum sterku liðunum stóra mótstøðu í ár, so dysturin millum hesi bæði liðini sá út til at vera ein avgreiðsluspurningur fyri VÍF, sum skuldi hava trý løtt stig afturat á ferðini móti sannførandi meistaraheitinum í ár.

### Javnt at byrja við

Tað gekk tó javnt á fyrstu minuttirnar, og H71 sá út til at megna at forða VÍF í at seta seg á dystin og fáa trygga leiðslu tíðliga í dystinum. Men so hvørt sum fyrri hálvleikur leið, gjørdist VÌF liðið betri, og álopsspælið hjá H71 riggaði ikki eins og tað skuldi. Fleiri mistøk vóru gjørd í álopsspælinum hjá hoyvíkingum, og VÍF revsaði H71 hvørjaferð við mótálopum sum førdu til mál. Álopsspæli hjá VÍF gekk skjótt, og tað var meiri enn H71 verjan megnaði at gera nakað við. Støðan var 10-13 móti endanum av fyrra hálvleiki, men hóast tað megnaði VÌF at koma uppá 17 mál áðrenn hálvleik, meðan H71 enn var á 10 málum. Eftir at liðini høvdu verið jøvn ígjøgnum fyrra hálvleik, tók VÍF sostatt eina sjey máls leiðslu, sum skuldi tryggja teimum trý stig at hava í viðførinum við aftur til Vestmanna.

### Mistøk og lítil konsentratión

Hoyvíkingar vístu gott hondbóltsspæl í byrjanini av seinna hálvleiki, og teir megnaðu at koma innaftur í dystin. Eftir stutta tíð fingu hoyvíkingar eina sjey máls leiðslu hjá VÌF niður í bert trý mál, og spenningur var aftur í dystinum, hóast VÌF sá út til at hava tamarhald á støðuni. Sera nógvir málmøguleikar vóru misnýttir, serliga hjá vestmenningum, og sera nógv mistøk vórðu framd av báðum liðum. Tað tóktist ikki at vera nøkur konsentratión á liðunum báðum, og mistøkini og misskiljingarnar vóru sera nógvar. Málverjin hjá VÌF kom enntá tíðliga í seinna hálvleiki framvið í álop, og hann hevði ein og tveir góðar møguleikar at skora.

Men miðskeiðis í seinna hálvleiki setti VÍF ferðina upp, og teir tóku aftur eina trygga leiðslu í dystinum. Teir vístu til tíðir gott álopsspæl, og fleiri góðar kombinatiónir vóru til tíðir at síggja. Verjan hjá H71 megnaði ikki at stegða skjúttunum hjá VÌF, og spælið hekk als ikki saman hjá teimum. Hoyvíkingar valdu at mansverja Áka og Inga Olsen saman við Sámali Joensen partar av seinna hálvleiki, og tað gav nógv pláss til hinar VÍF leikararnar. VÍF hevur nevniliga fleiri streingir at spæla á enn bert teir tríggjar fyrrnevndu VÍF leikarar, og hetta nýttu serliga VÍF leikararnir Martin Hummeland og Johnny Joensen til fulnar. Eins og í fyrra hálvleiki revsaði VÍF hvørt álopsmistak hjá H71, og við skjótum mótálopum fingu vestmenningar fleiri mál.

Móti endanum av dystinum, tá alt longu var avgjørt, var lítil og eingin konsentratión at síggja á liðunum báðum. Mistøkini vóru mong, verjuspælið hjá hoyvíkingum var vánaligt, og tað var ein dámur av óseriøsiteti móti endanum av dystinum. Hetta førdi tó við sær nakrar undirhaldandi detaljur, og liðini høvdu ráð at taka nakrar kjansir. M.a. var VÌF málverjin í heilum við í álopið, men hann megnaði tó ikki at skjóta nakað mál fyri VÍF. Halgir Dahl Olesen stóð fyri einum ser flottum málið, har hann skrúvaði bóltin út um málverjan, áðrenn hann broytti kós í netmeskarnar, meðan Sámal Joensen hjá vestmenningum skeyt eitt sera flott brotspark, har hann snýtti málverjan við skotfintu áðrenn hann hann kastaði bóltin róligt upp um málverjan.

### Sannførandi sigur

Samanumtikið vann VÍF ein sera sannførandi sigur, sum ikki varð spældur á sera høgum støði. Endaliga úrslitið var 31-22 til VÌF, og var dysturin á Hálsi mest ein avgreiðsluspurningur hjá vestmenningum, hóast H71 í løtum vísti gott hondbóltsspæl.

Dysturin líktist móti endanum ikki einum 1. deildar dysti, við tað at alt var avgjørt miðskeiðis í seinna hálvleiki, men VÍF fekk trý stig afturat, og einki lið hevur nú nakran møguleika at gera seg galdandi í FM stríðnum. Vinnur VÍF mikukvøldið á StÍF inni á Strondum, er FM heitið reint teoretiskt heima, og við spælinum teir hava víst í ár eru teir favorittar til hendan dystin, hóast teir máttu lúta fyri strandingum í steypafinaluni.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
H71: Halgir Dahl Olesen 9(4), Agnar Højgaard 4, Johnny Durhuus 3, Anfinn Debes 3, René Dahl Olesen 2, Høgni Joensen 1
VÍF: Sámal Joensen 6(3), Ingi Olsen 6, Martin Hummeland 6, John Zachariassen 3, Sjúrður Holm 2, Agnar Joensen 2, Áki Olsen 2
Brotskøst: H71 5, VÍF 4
Útvísingar: H71 3, VÍF 4
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen

VB–Kyndil 42–26 (23–15)

# VB kvinnurnar sera sannførandi

**Dysturin millum VB og Kyndil sunnudagin gjørdist ein stórsigur til VB, og harvið kann staðfestast, at mangt er broytt í føroyskum kvinnuhondbólti**

HONDBÓLTUR
*Heini í Skorini*

Fyri ikki so nógvum árum síðani vóru kvinnuliðini hjá Neistanum, Kyndli og VÍF bestu og mest dominerandi liðini í landinum, meðan lið sum Stjørnan og VB ongantíð vóru góð boð uppá FM meistaraheitið. Men nógv er broytt síðani tá, og í dag sær myndin ikki út á sama hátt sum fyri nøkrum árum síðani. At toppurin í føroyskum 1. deildar hondbólti hjá kvinnum er VÌF, VB og Stjørnan, meðan havnarliðini Kyndil og Neistin eru munandi veikari, vísir, at mangt er broytt í stutta tíð í føroyska hondbóltsheiminum.

### Kyndlakvinnurnar vánaliga byrjan

Hetta var eisini sjón fyri søgn, tá VB tók ímóti Kyndli suðuri í Vági. VB kvinnurnar settu seg beinanvegin á dystin, og Kyndil megnaði einki at gera við vælleikandi VB liðið. Tá dysturin nærkaðist miðjuni av fyrra hálvleiki, var støðan heili 10-3 til VB, og ein fekk skjótt fatan av, hvat lið fór at vinna dystin. Sera nógv mál komu ígjøgnum fyrra hálvleik, og hálvleiksstøðan kundi eins væl verið eitt endaligt úrslit í hondbólti. Hálvleiksstøðan var 23-15 til VB.

### Framúrskarandi VB-álopsspæl

Málini hildu á at skola inn, og kyndlaverjan megnaði einki at gera við vælleikandi VB liðið. Tær sýndu sera gott álopsspæl, og málini í dystinum vóru sum sagt sera mong. VB kom til seinast uppá heili 42 mál, meðan Kyndil fekk 26, so talan var um ein sera málríkan dyst suðuri í Vági. VB sat á dystinum frá byrjan til enda, og tær vístu, at tær eru eitt lið á veg uppeftir, meðan tað sær verri út hjá Kyndli. At lata 42 mál inn í einum dysti, ber ikki boð um gott verjuspæl, meðan tær harafturímóti skoraðu 26 mál, sum jú heldur ikki er so galið. At skjóta 26 mál kann bara ikki nýtast til nakað, tá málini hjá mótstøðuliðinum vóru næstan tað tvífalda .

Sostatt fekk VB trý týdningarmikil stig afturat í landskappingini, og tær liggja í løtuni væl fyri at ogna sær silvurkrónurnar. Men Stjørnan andar VB í nakkan, og um VB snávar í einum dysti, samstundis sum Stjørnan vinnur, kann myndin gerast heilt øðrvísi.

Kvinnuliðið hjá Neistanum blandar seg eisini í stríðið um heiðursmerki, so nógv er enn at spæla um, hóast tað ikki er sannlíkt, at nakað lið megnar at gera nakað við suverena oddaliðið VÌF í ár.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Gurið Mortensen 11, Regina Rádó 7(2), Andrea Lutz 6, Kristina Holm 4, Margret Augustinussen 4, Laila Jespersen 3, Marjun Krosslá 3, Eyðbritt Krosslá 2
Kyndil: Lotte Sørensen 11(4), Erla Smith 4, Jensia Petersen 4, Ann Hansen 3, Óluva Dalsgaard 2, Kristbjørg Petersen 1, Anita Kjærbo 1
Brotskøst: VB 3, Kyndil 5
Útvísingar: VB 4, Kyndil 2
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*VB kvinnurnar vóru greitt oman á móti Kyndli sunnudagin, og halda sostatt framvegis fast í møguleikanum fyri silvurkrónum*



Sóljan-VÍF 11–32 (6–17)

# Eitt fet nærri gullinum

**VÍF kvinnurnar nærkast FM-gullinum og greipuni við fullari ferð, og sunudagin fekk Sóljan ikki gjørt stórvegis fyri at steðga teimum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað tykist alt meira ein sannroynd, at VÍF fer at ogna sær føroyameistaraskapin í kvinnuhondbólti hetta kappingarárið. Gaman í væntar teimum enn trý stig fyri at verða matematiskt tryggar í gullinum, men tað er so ikki líkt til, at nakar fer at seta teimum ein kíla í á vegnum.

### Toppur og botnur

Sunnudagin vitjaðu tær botnliðið úr Sóljuni, og hóast tær hjá VÍF ikki gjørdu nakað fyri at seta metið, sum Stjørnan setti fríggjadagin, so var ongan tíð ivi um, hvar stigini skuldu fara.

Fyrstu løtuna fekk tó so hampuliga javnt, og eina løtu var støðan fýra mál til hvørt liðið, men so tóku tær hjá VÍF dik á seg.

Tað alt kom til alt, hevði VÍF vunnið við 21 málum, og úrslitið varð soleiðis enn ein staðfesting av muninum, sum er ímillum topp og botn.

### Ikki vísar

Ein av leikarunum hjá VÍF er Nikolina Eyðbjørnsdóttir, og um sjálvan dystin helt hon ikki, at hesin var tað stóra at skriva um.

– Eg haldi ikki, at tað var nakar trupulleiki at vinna, men eg fýlist á, at vit tóku heldur lætt upp á uppgávuna fyrstu løtuna. Vit eiga ikki at taka nakað fyri givið – heldur ikki, tá vit spæla móti botnliðum, segði hon um dystin.

Um gullmerkini, sum eftir øllum at døma bara bíða eftir VÍF, vildi Nikolina tó ikki siga tað stóra.

– Eg má viðganga, at tað skal ganga øgiliga illa, um vit ikki skulu gerast føroyameistarar, men enn haldi eg ikki, at nøkur á liðnum tekur tað fyri givið, at vit fara at vinna. Í útgangsstøði kann alt henda, og tí vil eg ikki siga nakað um hetta enn, sigur Nikolina.

Og at tað skal ganga illa, um VÍF ikki skal vinna gull, er einki at tosa um. Fáa tær trý stig afturat, er eingin, sum kann taka tær, so eftir øllum at døma, ganga tvey umfør afturat, men so kunnu tær hjá VÍF ikki koma við nakrari umbering. Tá verður tað staðfest, at tær hava vunnið gullmerkini, sum øll onnur uttan tær sjálvar langt síðani hava ásannað.



*Hóast tær hava lagt kappingarneytarnar úr Stjørnuni væl aftur um seg, so vil Nikolina Eyðbjørnsdótti enn ikki hoyra nakað tos um FM og gullkrónur*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Sóljan: Marjun Jørgensen 4(2), Heidi Haraldsen 2, Louisa Jørgensen 1, Heidi Maria Akselsen 1, Hertha Simonsen 1, Fía Selma Nielsen 1, Sólja Nielsen 1
VÍF: Fríða Marjunardóttir 10, Ioana Rápa 8(3), Sóleyð Mikkelsen 6(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Jacklin Durhuus 3, Alis Høghamar 1
Brotskøst: Sóljan 2, VÍF 6
Útvísingar: Sóljan 3, VÍF 1
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Bárður Brimvík

# Metsigur í Klaksvík

**Tað varð staðfest við sjey tumma seymi, at munurin millum topp og botn í bestu kvinnudeildini er risastórur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*Tað var ikki fyrr enn fyrstu 25 minuttirnir vóru lagdir aftur um bak, at Sóljan yvir høvur slapp á máltalvuna*

Tað mundu vera tey allar fægstu, sum vóru í iva um, at tað fór at eydnast Stjørnuni at fáa tvey stig burtur úr heimadystinum móti Sóljuni. Munurin millum liðini hevur í alt ár verið sjónligur, men í fyrsta dystinum á árinum var tó nær við, at Stjørnan fekk ein rættiliga skelk.

Úrslitið í fyrsta inanhýsis dystinum gjørdist ein fýra máls sigur til Stjørnuna, og ikki minst verður dysturin mintur fyri, at Simona Dziugyte trein fram á føroyska pallin við 16 málum móti verandi meistarunum.

### Bíðaðu eftir málinum

Síðani tá er tó nógv hent, og fyri hesi bæði liðini hevur tað ikki minst havt týdning, at litaviski stórskjúttin hevur skift Sóljubúnan við tann hjá Stjørnuni.

Meira enn nøkur onnur var hon orsøkin til, at talan fríggjadagin gjørdist um ein metstigur, har vágagenturnar at enda bert mundu hugsa um, nær dysturin skuldi enda. Við sínum trettan málum varð hon í øllum førum toppskjútti, og hóast talan kanska var um eina bíliga bakgrund hesaferð, so hava avrik hennara seinastu vikurnar borið boð um, at hon nú er um at finna seg til rættis á liðnum.

Longu frá fyrsta bríksli tóktist greitt, at útiliðið einki sum helst skuldi hava at siga móti gramma heimaliðnum. Í verjuni syrgdu klaksvíkingarnir fyri, at so at siga eingin bóltur kom framvið, og í álopspartinum royndu tær ferð eftir ferð at spæla tunt, soleiðis at sleppast kundi til skot móti málinum, har Kristina ferð eftir ferð var prísgivin av viðleikarum sínum.

Sum tíðin leið, tóktist alt bert at verða ein spurningur um, hvør tað yvirhøvur skuldi eydnast Sóljuni at skora, fyrr enn farið varð til hálvleiks. Hetta eydnaðist, tá 25 minuttir vóru leiktir, men tá høvdu tær úr Klaksvík longu skorað 21 ferðir, so málið gjørdi lítla aðra nyttu enn at strika nullið á talvuni.

### Andriana við aftur

Umframt at tað sjálvsagt var hugaligt hjá heimaliðnum at vinna somikið sannførandi, so mundi tað eisini kennast fløvandi, tá Andriana Milodanovic kom á vøllin í seinna hálvleiki.

Hon byrjaði við at brenna eitt brotskast, men eftir hetta setti hon fulla ferð á, og tað eydnaðist henni eisini at skjóta átta mál.

At Andriana nú er við aftur, og at Simona hevur tókst sannførandi í seinastuni, er tó ikki nóg mikið hjá Stjørnuni til at endurvinna meistaraheitið. Hinvegin ber tað boð um, at Stjørnan eisini komandi árini fer at hava eitt lið, sum veruliga kann blanda seg upp í toppin, so tað ganga neyvan aftur 24 ár millum meistaraheitini aftur.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Simona Dziugyte 13(2), Andriana Milodanovic 8, Anna Kristina Samson 6(1), Annika Ljósstein 4, Bára Skaale 3, Vesna Radovic 2(1), Una Olsen 2(1), Rannvá Andreasen 1, Sólvá Eystberg 1, Berlina Sólsker 1
Sóljan: Sólja Nielsen 1, Hertha Simonsen 1, Jóhanna í Horni 1
Brotskøst: Stjørnan 7
Útvísingar: Sóljan 8
Diskvalifikatión: Sóljan 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen. Høvdu lítið annað at gera enn at halad skil á málskjóting og útvísingum.